# Ættarliðini syngja saman

**Á samfelagsstevnuni, sum brøðrasamkomurnar kring Skálafjørðin skipa fyri á páskum, verður leygarkvøldið skipað fyri stórum sangtiltaki, har ætlanin er at borðreiða við sangi fyri øll ættarliðini**



*Ferðalagið, sum í 2000 var úr Ebenezer og vitjaði í Whitby. Borgarstjórin og Paul Wheater, sum skipar fyri stevnuni, eru her saman við føroyingunum. Fremst eru Jens Christian Guttesen, sangstjóri, og Alexander Samuelsen, ferðaleiðari.*

PÁSKASTEVNA
*Jan Müller*

Páskirnar eru ein av teimum trimum stóru hátíðunum í kristna heiminum. Í Føroyum sæst hetta aftur í, at nógv verður gjørt burturúr í kirkjum og samkomum.

Vit hava í bløðunum seinastu dagarnar nevnt fleiri av tiltøkunum, sum verða á skránni.

Brøðrasamkomurnar kring Skálafjørðin bjóða til samfelagsstevnu á páskum. Tað eru samkomur á Skála, í Søldarfirði, í Saltangará og á Toftum. Samkomurnar eru felags um at skipa fyri. Skírisdag og Langa fríggjadag verða samkomur í Nerija á Skála, og páskaaftan og páskadagarnar fer tað mesta at ganga fyri seg í ítróttarhøllini í Runavík. Har verða fundir leygarkvøldið klokkan átta, páskadag klokkan 18 og 2. páskadag klokkan 16 og 19. 2. páskadag bjóða samkomurnar øllum teimum, sum møta upp, eina máltíð ímillum teir báðar fundirnar. Umframt felagssang verður á øllum fundunum eykasangur. Eitt nú skal sangkórið í Siloa í Fuglafirði, sum hevur manning úr fleiri plássum í Eysturoy, syngja 2. páskadag.

Serlig tiltøk vera fyri børn og ung. Páskaaftan verður barnamøti í høllini, har søga, sangur og drama verður á skránni, og sunnudagsskúli verður í Berøa páskadag. Langa fríggjakvøld og páskakvøld eru serlig tiltøk fyri ung á skránni í Berøa.

Í ítróttarhølini í Runavík verður høvi at keypa góðan kristiligan lesna. Tað er bókasølan Logos í Havn, sum fer at hava eitt bókaborð á stevnuni.

### Felagssangurin

Leygarkvøldið klokkan tíggju verður serligt sangtiltak á skránni, sum er ætlað øllum ættarliðunum.

– At tað verður sagt, at summi tiltøk eru fyri børn og onnur fyri ung ber ikki boð um, at øll ikki eru væl komin. Heldur vil tað siga, at skráin serliga er løgd av teimum ungu, og at hon er rættað ímóti hesum bólkunum, men sjálvandi eru øll vælkomin, siga fyrireikararnir.

Fyri tveimum árum síðani var skipað fyri sangløtu við fjølbroyttum sangi og tónleiki páskaaftan í ítróttarhøllini í Runavík.

– Tiltakið varð sera væl fagnað. Fjøldin, sum møtti upp, var rættuliga stór. Tá vóru tað fleiri, sum søgdu seg sakna, at møguleiki var at syngja við. Roknað verður við, at tiltakið, sum verður klokkan tíggju páskaaftan, fer at vera einar tveir tímar, og ætlanin er, at umleið ein hálvur tími skal brúkast til felagssang, siga fyrireikararnir.

Sangúrvalið verður bæði sangir, sum serliga tey ungu plaga at syngja, og so teir góðu gomlu sálmarnir, verður sagt. Bæði ungfólk og meiri tilkomin fara at leiða felagssangin, og nógv verður gjørt burturúr fjølbroyttum undirspæli.

### Luttakararnir

Á sangløtuni fara sjey bólkar at luttaka: Salt, kvinnubólkur av Toftum, tveir ungdómsbólkar av Toftum, Tausen systkini av Toftum, Dupult kvartettin í Ebenezer og Tripletrio úr Ebenezer.

Tá ið so nógvir ymiskir bólkar eru við, og tá ið ætlanin er at hava nógvan felagssang og tíðarkarmurin er umleið tveir tímar, so sigur tað seg sjálvt, at íkastið hjá hvørjum einstøkum verður avmarkað. Summir bólkar fara at syngja ein og tveir sangir, og aðrir fara at syngja einar fðra sangir. Ætlanin er, at øll tey, sum skulu luttaka, skulu sita á pallinum og harvið vera við til at stuðla felagssanginum, verður sagt av Skálafjørðinum.

Sangbólkurin Saltbrøður er serligur á tann hátt, at tey ofta framføra uttan undirspæl. Soleiðis verður tað eisini leygarkvøldið. Tað kann kanska roknast við, at tey eru hampuliga væl fyri, tí tey fyrireika seg til konsertferð. Um góðar tvær vikur skulu tey til Skotlands at luttaka í stórum sangtiltaki í Fraserburg. Dupult kvartettin og Triple trio í Ebenezer hava áður tikið lut í hesum árliga afturvendandi tiltakinum. Sambandið úr Fraserburg og til Føroya kemst upprunaliga frá tí, tá ið skotar fyri mongum árum síðani fiskaðu við sluppum undir Føroyum og plagdu at vera á møti hjá samkomunum, eitt nú í Vági.

Dupultkvartettin og Tripletrio í Ebenezer eru í holtur við at fyrireika ferð til Onglands. Frá 15. og til 19. mai skulu tey syngja á Gospel Music Convention í Whitby í Yorkshire. Har hava tey sungið tvær ferðir áður. Á stevnuni, sum hvørt kvøldið savnar eini 700 fólk, skulu tey syngja saman við bólkum úr t.d. Onglandi, Írlandi og eisini USA. Í væl umtóktu Bill Gaider sendingunum, sum eru at síggja í sjónvarpinum, luttaka fleiri, sum Dupultkvartettin og Tripletrio hava sungið saman við í Onglandi.

Tausen systkini á Toftum eru Oddmar, Jaspur og Olivia. Tað hevur ikki verið so nógv at hoyrt til teirra trio seinnu árini. Men nú eru Jaspur og Oliva flutt úr Danmark og aftur til Toftir, og nú fara tey trð at syngja saman aftur.

Kvinnubólkurin á Toftum hevur sungið tey seinnu árini. Umframt á Toftum hava tær eisini sungið í fleiri øðrum samkomum.

Fyri tveimum árum síðani varð fløgan Vit eru glað útgivin. Oddmar og Anita Tausen vóru útgevarar. Fleiri av sangarunum vóru av Toftum. Talan er um ungdómar, sum eru millum 14 og 20 ára gamlir. Á sangsamkomuni leygarkvøldið fara tey at manna tveir sangbólkar.

– Gleðiboðskapurin fer á samkomuni at verða boðaður ígjøgnum sangin, sum øll ætt arliðini kunnu savnast um, siga tey av Skálafjørðinum, sum vænta nógv fólk og ætla at byrja stundisliga.



*Kvinnubólkurin av Toftum tá ið hann fyri einum ári síðani sang í Hebron á Argjum*



*Sangbólkurin Saltbrøður. Aftast: Bárður á Lakjuni. Í miðjuni Eydna Jacobsen og Jóan Magnus Olsen. Fremst: Arnvør á Torkilsheyggi, Paula Jespersen og Elsubeth Lassaberg*



# Suðuroyarkabarettin – verd at vitja

**Í hesum døgum hava áhugaleikarar í Suðuroynni tikið stig til eina kabarett. Framført verður á Gistingarhúsinum í Øravík, so ein betri biti fæst eisini, umframt skemt, men enn hava suðuroyingar ikki rættiliga raggað sær út um bygdargarðin fyri at hugna sær við skemtileiki, hóast kabarettin hevur ymiskt skemtiligt at bjóða og er verd at vitja**



SJÓNEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Gistingarhúsið við Á í Øravík er góður karmur um Suðuroyarkabarettina, sum í hesum døgum verður framførd. Hóast ofta hoyrist, at ov lítið er at fara til í útjaðaranum, so tykist ikki, sum tikið verður av øllum teim møguleikum, sum stinga seg upp.

Fríggjakvøldið var kabarettin framførd. Møguleiki var at fáa sær ein betri bita undan skemtinum. Men bert eini 20-25 fólk sótu í salinum, tá tjaldið fór frá. Og tað kann ikki sigast at vera tekin um, at fólk keða seg ella hava ov lítið at fara til.

### Fynd í

Men tað skal sigast leikarunum til rós, at hóast tað er tungt at spæla skemtileik fyri fámentari fjøld, so eydnaðist at fáa láturvøddarnar til arbeiðis.

Hugnaliga umhvørvið, gott ljóð og ljós og livandi hugnatónleikur skapa tryggan botn at byggja á hjá leikarunum. Og samstundis livir hetta upp til krøvini hjá áskoðarunum.

Leikararnir hittust til skeið hjá MáF og gjørdu av at halda fram við einum hugskoti um lokala kabarett. Og væl hevur gingist.

Har eru smáleikir ímillum, sum fynd er í. Serliga kom láturin fram, tá røtt var um løgregluna, sum sjáldan er at hitta, um pizza, taxakoyring, dálking, Jenis, Óla og Fiskimannafelag, Høgna, Annlis og mong onnur.

Leikararnir komu væl frá sínum leiklutum. Sjálvi hava tey skrivað og lagt tilrættis. Evnini eru tey flestu aktuel.

### Áhugi, yrkisleikur, leikhús, útjaðari

Skal hinvegin hvassi pennurin finnast fram, so er eisini okkurt at festa á blað. Hóast vandin ofta er at gera av við spírandi list við ov hvøssum penni, so eru listafólk oftast fegin um vælmeintan kritikk. Og væl meintur er hann, tí áhugaleikur er áhugaleikur og er sera kærkomin í hesum døgum, tá yrkisleikarar hava nógv um oyruni í leikhúsinum, sum liggur so langt frá útjaðaranum, og sum annars fekk kærkomnar vitjanir í teim døgum, tá vanligt var at ferðast við leikum.

Sigast kann, at ferðin á leikinum var á leið sum heild, men har vóru løtur, tá ferðin var ov lág til slíkan skemtileik, kabarett. Flog krevur ferð og í løtum misti kabarettin flogið. Skal stutt gerast av við hvassa penninum, so kann sigast, at tað at vevja longi í einum og sama stað ella evni ber ikki leikinum uppi. Kanska kundi ein vika verið nýtt afturat til síðstu betringarnar. At stramma upp í leikritinum, eru kanska eini góð ráð, so tað er meira »ping pong«, meira ferð á samskiftinum millum leikarar og pointini koma meira sum maskinbyrsuskot og ikki sum frá gamlari fuglabyrsu. Skiftini eiga eisini at fara skjótari fram og tað kunnu tey óivað, tí pallurin er ikki so trupul at fyrireika og arbeiða við. At enda kann hvesti pennurin minna á hárfína markið millum skemt, og so har skemt, leikarar og áhoyrarar ikki longur grynna og missa hvør annan burtur í tí, sum betri var ósagt, men tó sera skilligt.

Tað er í grundini í hesum síðsta, at stórur partur av skemtileiklistini hevur grundvøll og framdrift.

Og so er tíð uppá at leggja hvesta pennin. Tað er so lætt at siga aftaná, at tað kundi verið betri og átti at verið so ella so.

Sannleikin er, at Suðuroyarkabarettin borgar fyri góðsku og skemti. Og bæði leikur, tónleikur, leiklongd og ikki minst umstøður eru, sum ein kann ynskja sær. Áhugaleikarar, takk fyri stigið at seta upp kabarettina!

Tungt er at framføra fyri fámentari fjøld. Um nøkur skomm er, so er hon ikki tykkara, men hana eigur fjøldin, sum ikki stuðlar við at vitja kabarettina, men heldur grenjar, tá einki er at hyggja at.

Takk fyri hugnaliga og skemtiliga løtu fríggjakvøldið. Framførið kabarettina fleiri ferðir og haldið fram sum leikbólkur, tí dugur er í.



